Til Landsstýrismálanevndina

Á fundi í Landsstýrismálanevndini tann 13. mars 2008 hevur nevndin heitt á nevndarskrivaran um at gera nevndini eitt tilmæli sambært § 5, stk. 3 í starvsskipanini í sambandi við áheitan frá Finni Helmsdal, tingmanni, um, at nevndin tekur málið um innflutningsloyvi og flyting av fiskiloyvum til nýggja Næraberg til viðgerðar.

Av tí, at málið er reist í sambandi við ófráboðaðan fyrispurning í tinginum, fyriliggur einki tilfar, sum nevndin kann nýta at gera eina meting av, hvørt rímilig grund er at halda, at brot er framt á lóggávuna.

Fyri at kunna gera eitt tilmæli sum grundarlag fyri eini meting av, um Fiskimálaráðið - við fyrrverandi ella verandi landsstýrismanni - hevur røkt sínar skyldur á fullgóðan hátt, verður mælt til, at Landsstýrismálanevndin biður landsstýrismannin í fískivinnumálum um at fáa innlit í málið, herundir søguna hjá nevnda ella nevndu fiskiloyvum.

25. mars 2008

Kristina Samuelsen
nevndarskrivari